Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 12

ISSN 0907-905X

Nr. 41

7. mai 2010

**Løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 13. november 1998, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Aftaná § 10 verður sum nýggjur kapittul settur:

**“Kapittul 4a**
**Gjøld**

**§ 10a.** Eigari skal gjalda fyri upptøku í og striking úr skránni, undir hesum gjald fyri tjóðskaparbræv og gjald fyri veðbrøv og skaðaloysisbrøv v.m., til fígging av umsitingini av skipaskránni.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um gjald sambært stk. 1, undir hesum at gjøldini fyri upptøku í skránna og fyri tjóðskaparbræv verða ásett við støði í skipastøddini (BT).

**§ 10b.** Eigari av skipi, skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá, skal gjalda eitt árligt gjald pr. skip til Skipaeftirlitið til fígging av uppgávum eftir sjóvinnulóggávuni, sum Skipaeftirlitið røkir viðvíkjandi skipum, skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá. Árliga gjaldið verður ásett við støði í aldri og stødd á skipinum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um gjald sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Gjaldið kann innheintast við panting.

**2)** § 11, nr. 6, verður strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 1. juni 2010.

Tórshavn, 7. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 116/2009

Nr. 42 7. mai 2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um postvirksemi**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Aftaná § 8 verður sett:

"**§ 8 a.** Ein loyvishavi eftir § 8 kann við góðkenning frá landsstýrismanninum seta á stovn og nýta eina dátuskrá við upplýsingum um teir postmóttakarar í Føroyum, sum loyvishavin hevur skyldu at tryggja postflutning til, sbr. § 4.

*Stk. 2.* Til at stovna og dagføra dátuskránna kunnu upplýsingar fáast til vega í elektroniskum líki frá skránni hjá Landsfólkayvirlitinum, uttan at persónarnir eru eyðmerktir frammanundan. Tað kunnu ikki latast aðrar upplýsingar enn tær, sum eru nevndar í § 35, stk. 2, nr. 1-5, 7-8 og 10 í Løgtingslóg um fólkayvirlit.

*Stk. 3.* Persónsupplýsingar, sum verða latnar til dátuskránna frá skránni hjá Landsfólkayvirlitinum sbrt. stk. 2, kunnu bara nýtast í sambandi við flutning av sendingum, sum eru fevndar av flutningsskyldu.

*Stk. 4.* Upplýsingarnar kunnu tó eisini nýtast í sambandi við flutning av øðrum sendingum, sum ikki eru fevndar av flutningsskyldu, tá atlitið til góðskuna og eina skynsama tilrættislegging av postflutningum ger tað neyðugt at blanda viðgerðina av slíkum sendingum og sendingum, fevndar av flutningsskylduni, saman.

*Stk. 5.* Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum er í aðrar mátar galdandi fyri raksturin av dátuskránni.

*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur ella leggja treytir við loyvinum sbrt. § 8 um rættin hjá øðrum postvinnurekandi at fáa upplýsingar úr dátuskránni hjá einum loyvishava, herundir ásetingar um gjald."

**2)** Í § 21, stk. 1 verður sum nr. 4 sett:

"4) Reglurnar um dátuskrá, sbr. § 8a, stk. 3-4."

**3)** Í § 21 verður sum stk. 3 sett:

"*Stk. 3.* Í reglum, sum eru ásettar við heimild í hesari lóg, kann verða ásett, at brot á reglurnar verður revsað við bót."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 7. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 136/2009

# Eykajáttanarløgtingslóg

**fyri**

**mars 2010-2**

# § 7. Mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løguætlan | - | - | - |
| **Mentan** | | **-** | **-** |
| 7.24.1. Ymsar útreiðslur | | - | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **7.24.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 24.1.04. Føroyahúsið í Keypmannahavn (Stuðulsj.) | J: | 1.733 | - |
| | **EYJ:** | **100** | **-** |
| 24.1.13. Ymiskir studningar (Stuðulsj.) | J: | 2.898 | - |
| | **EYJ:** | **-100** | **-** |

Tórshavn, 7. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 132/2009

## Kunngerð um broyting í kunngerð um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands

### § 1

Í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005 um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands, sum broytt við kunngerð nr. 18 frá 22. mars 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður sum stk. 3 sett:
"S*tk. 3.* Ásetingarnar fevna ikki um avreiðingar og veiðu hjá fiskiførum, sum á einum túri bert hava verið á beinleiðis veiði eftir stinglaksi, langasporli og blálongu."

2) Aftaná § 3 verður, áðrenn yvirskriftina "*Avreiðingar uttanlands*", sett:
"**§ 3a.** Uppboðssølukravið í § 3 er ikki galdandi fyri kalva, hávasløg og skøtusløg.
*Stk. 2.* Fram til 1. september 2010 er uppboðssølukravið ikki galdandi fyri hýsu."

3) § 4, stk. 2 verður strikað.
Stk. 3-6 verða hereftir stk. 2-5.

4) § 5 verður orðað soleiðis:
"**§ 5.** Tann í § 4, stk. 6 tilskilaða skráseting verður gjørd fyri 4. hvønn mánað fyri hvørt fiskifarið sær.
*Stk. 2.* Um fiskifør, sum eru í fiskidagaskipanini, hava avreitt meir enn loyvdu nøgdina av samlaðu veiðuni beinleiðis uttanlands, roknað fyri 4. hvønn mánað, verður fiskidagatalið, sum er nýtt til at veiða nøgdina, sum er avreidd ov nógv uttanlands í tíðarskeiðinum, ella nýtslan av egnari árskvotu, sum er avreidd ov nógv uttanlands í tíðarskeiðinum, hækkað við 30%. Um fiskifør, sum ikki eru í fiskidagaskipanini, hava avreitt meir enn loyvdu nøgdina av samlaðu veiðini beinleiðis uttanlands, roknað fyri 4. hvønn mánað, skal fiskifarið rinda avgjald, svarandi til 30% av søluvirðinum av tí veiði, sum er avreidd ov nógv beinleiðis uttanlands.
*Stk. 3.* Tá fiskidagar ella egin árskvota verða roknaðar sum nýttar sbrt. stk. 2, 1. pkt., verður hækkingin fyri seinasta uppgjørda tíðarskeiðið í einum fiskiári tikin av rættindunum hjá loyvishavara komandi fiskiárið.
*Stk. 4.* Tá kvotur undir Íslandi verða roknaðar sum nýttar sbrt. stk. 2, 1. pkt., kann Fiskiveiðieftirlitið í fiskiárinum, kvoturnar verða roknaðar sum nýttar, loyva øðrum skipum, sum hava loyvi at fiska undir Íslandi, at veiða kvoturnar. Kvoturnar verða býttar millum øll skip, sum hava loyvi at fiska undir Íslandi eftir teirra kvotuparti, tá uppgerðartíðarskeiðið endar."

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 10. mai 2010

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Kunngerð**
**um**
**útgjald av burturbeiningargjaldi á motorakførum**

Við heimild í § 12, stk. 4 og § 19, í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um motorakfør, sum hugtakið er allýst í ferðslulógini, tó undantikið motorsúkklur og prutl.

*Burturbeiningargjald*

**§ 2.** Burturbeiningargjald á kr. 5.000 verður goldið Akstovuni, tá ið motorakfar verður skrásett.

*Motorakfør ið verða beind burtur*

**§ 3.** Motorakfør, ið verða beind burtur, tí tey eru sett ella roknað ónýtilig av elli, skaða ella vantandi lutum, skulu í minsta lagi hava karossarí, rammu og tann partin av skrokkinum, sum skrokknummarið er sligið í.

*Móttøkustøð*

**§ 4.** Motorakfør kunnu bert verða latin inn til góðkenda móttøkustøð at beina burtur.
*Stk. 2.* Umhvørvisstovan dagførir yvirlit við góðkendum móttøkustøðum.

**§ 5.** Tá ið eigarin av motorakfarinum letur Akstovuni nummarspjøldrini, flýggjar Akstovan eigaranum frámeldingarváttan.
*Stk. 2.* Tá ið motorakfar verður latið móttøkustøðini at beina burtur, skal frámeldingarváttan fyri motorakfarið samstundis verða latin móttøkustøðini.

*Útgjald av burturbeiningargjaldi*

**§ 6.** Móttøkustøðin váttar við eini burturbeiningarváttan, at samsvar er millum upplýsingarnar á frámeldingarváttanini og motorakfarið, ið ætlanin er at beina burtur, herímillum skrokknummar á motorakfarinum.
*Stk. 2.* Móttøkustøðin skrásetur hesar upplýsingar í burturbeiningarváttanini:
1) dagfesting fyri burturbeining,
2) skrásetingarnummar á motorakfarinum,
3) skrokknummar á motorakfarinum, og
4) upphædd at gjalda eigaranum av motorakfarinum.

**§ 7.** Móttøkustøðin rindar eigaranum av motorakfarinum, ið skal verða beint burtur, kr. 4.000, tá ið tað verður latið inn at beina burtur.
*Stk. 2.* Móttøkustøðin sendir ta í § 6, stk. 2, nevndu burturbeiningarváttanina og frámeldingarváttanina til Akstovuna, sum skrásetur í akfaraskránni, at akfarið er beint burtur og góðkennir burturbeiningarváttanina.
*Stk. 3.* Tá ið móttøkustøðin móttekur ta í stk. 2 góðkendu burturbeiningarváttanina frá Akstovuni, sendir hon Føroya Gjaldstovu rokning fyri burturbeiningargjaldið og leggur burturbeiningarváttanina og frámeldingarváttanina við sum fylgiskjøl.
*Stk. 4.* Føroya Gjaldstova rindar móttøkustøðini kr. 5.000 fyri burturbeinda motorakfarið.
*Stk. 5.* Motorakfør, ið vóru skrásett áðrenn 1. juni 2008, tá ið løgtingslógin um avgjøld við skráseting av motorakførum kom í gildi, fáa eisini burturbeiningargjald afturgoldið sbrt. stk. 1.

*Útgjald av burturbeiningargjaldi við útflutningi av motorakførum*

**§ 8.** Verður motorakfar strikað í akfaraskránni og flutt av landinum, kann eigarin fáa afturgoldið part av virðisgjaldinum. Burturbeiningargjald verður eisini afturgoldið, um eigarin fær part av virðisgjaldi ella skrásetingargjaldi afturgoldið.
*Stk. 2.* Akstovan rindar eigaranum kr. 5.000 í burturbeiningargjaldi, samstundis sum møguligur partur av virðisgjaldinum ella skrásetingargjaldinum verður afturgoldin.
*Stk. 3.* Akstovan skrásetur í akfaraskránni, at motorakfarið er útflutt.
*Stk. 4.* Verður motorakfar, sum er útflutt og hevur fingið afturgoldið burturbeiningargjald, flutt inn aftur til Føroyar, skal eigarin gjalda Akstovuni tað burturbeiningargjaldið aftur í landskassan, sum varð afturgoldið, tá ið motorakfarið varð flutt av landinum, sí stk. 1 og 2.

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 11. mai 2010

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705